SAMRØÐA

# Sigla av Tvøroy… Noregs sum ræt…

– HETTA ER EIN MÁTI AT FÁA SMAKKIN AV TÍ, SUM TEIR GOMLU VÍKINGARNIR FÓRU ÍGJØGNUM. TAÐ ER RINGT AT SIGA NEI TIL, SIGUR LIVAR NYSTED, SUM SAMAN VIÐ ØÐRUM FER AT SIGLA TIL NOREGS VIÐ SEKSÆRINGINUM Á TVØROYRI, NADDODDI. STIGTAKARIN ANDY FITZE ÆTLAR, AT UNGIR FØROYINGAR SKULU VERA VIÐ TIL AT MANNA BÁTIN, TÁ HANN KOMANDI ÁR SKAL SIGLA AFTUR TIL FØROYA

**Pætur Hjalmar Evensson**

HVUSSU VAR TAÐ AT SIGLA sum víkingur í 9. øld?

Tað fara hvannasundsmaðurin Livar Nysted og fimm onnur sær at finna útav, nú tey í næstu viku leggja frá landi á Tvøroyri við seksæringinum Naddoddi.

Túrurin hevur fingið navnið The Viking Voyage, og hetta er ein ambitiøsur túrur, har manningin ordiliga kemur at royna síni mørk á opna havinum. Ætlanin er at sigla til Noregs tvørturum Norðsjógvin við Naddoddi, sum er ein bátur, ið minnir um víkingabátarnar tá í tíðini við segli.

– Hatta er nakað, sum eg havi havt hug til, síðan eg minnist. At gera eina sovorðna ferð, líka sum víkingarnir gjørdu. Víkingar hava altíð havt mín stóra áhuga. So tá man fær ein sovorðnan møguleika, so er ringt at siga nei, sigur Livar Nysted.

Skipari og leiðari umborð verður Andy Fitze, sum er ein royndur ævintýrari úr Sveis, ið hevur siglt nógvar "ekstremar" og avbjóðandi túrar. Eisini er ein ung søgulesandi úr Mexico við serligum áhuga fyri víkingasøgu við, sum eitur Karla Dana. Leikluturin hjá føroyska Livar Nysted verður at deila frá sínari vitan um langar ferðir í lítlum bátum og sjálvandi rógva, tá líkindi eru fyri tí. Aftrat teimum verða trý aftrat, sum eita Martin Fitze, Säny Blaser og Georg Aebi.

Hesin túrurin verður roknaður sum ein "Explorer Club Flagged Expedition". Explorer Club er ein prestisjufullur altjóða felagsskapur fyri fólk, ið kanna og rannsaka land, hav, luft og rúmdina. Tvey av manningini eru limir í hesum felagsskapi, Andy Fitze og Karla Dana, og hetta gevur túrinum eyka tyngd, um man kann siga soleiðis.

## Lovaði tvøramonnum at koma aftur

Hugskotið til túrin eigur sveisiski Andy Fitze.

– Søgan er nokkso fitt, sigur hann og greiðir nærri frá:

– Eg var í Føroyum í fjør fyri aðru ferð. Eg sigldi kring oyggjarnar og kom til Suðuroyar. Tað var á mínum føðingardegi, og tvørafólk bjóðaðu mær inn í Naddoddaneystið í Trongisvágsfirði, har eg so hoyrdi søguna um hendan vakra bátin, sum varð bygdur í 90'unum. Aftaná eina løtu gav eg teimum hondina og lovaði, at eg kom aftur higar við einari manning, sum kundi sigla bátin til Noregs og aftur, fortelur Andy Fitze.

Síðan tá hevur hann arbeitt við at samla manningina og planleggja túrin. Og nú er so gott sum klárt, til tey fara at leggja frá landi á Tvøroyri.

Ætlanin er at fara avstað mánadagin, men um veðrið ikki er til vildar, so verður bíðað, til rætti vindurin er.

## – Hetta verður ein góður túrur

Við høgum aldum og hørðum vindum í einum opnum báti sleppur manningin ordiliga at royna síni mørk.

Hetta er 26. ferðin hjá Andy Fitzer, og hann er sum vera man spentur.

– Hetta verður ein so góður túrur. Tað verður ekseptionelt fyri meg, sigur hann.

– Báturin hevur onga verju ella skjól. Eg havi ongantíð siglt við einum slíkum báti fyrr, so hetta er nýtt fyri meg. Tað er nýtt fyri øll í manningini. Vit hava eina góða manning.

Men er tað ikki vandamikið?

– Eg haldi ikki, tað er vandamikið. Sjálvandi er har ein risiko, men vit vita, hvat vit gera. Báturin er eins einfaldur, sum víkingabátarnir vóru tá, og vit eru væl útgjørd og fyrireikað. Vit hava eisini samband við bjargingartænastuna, sigur hann.

## Ringt at siga nei

Livar Nysted er royndur havrógvari og hevur eftir hondini fleiri heimsmet.

*Hvussu ber til, at tú skalt við á hendan túrin, Livar?*

– Johan Olsen, sum hevur smíðað Naddodd, spurdi meg. Eg møtti honum í Effo á Skálabotni, og hann fortaldi, at nakrir úr Sveis planløgdu eina ferð við Naddoddi. Teir í Naddoddi kundu hugsað sær, at ein føroyingur var við, og hann spurdi so, um eg hevði áhuga. Og tað hevði eg sjálvandi, fortelur Livar Nysted.

At sleppa at royna seg, júst eins og víkingarnir gjørdu, er hann sera spentur til.

– Endamálið er jú at endurskapa eina slíka ferð, sum víkingarnir gjørdu. Vit hava sjálvandi modernaða útgerð við GPS'ara og bjargingarútgerð. Men ferðin verður upp á sama máta. Vit hava bara vindin, segl og ein opnan træbát. So tað eru somu fortreytir, sum teir gomlu høvdu, tá man hugsar



***Manningin*** *Mynd: Säny Blaser*

# ri til
# tir víkingar



***Naddoddur á sjónum***
*Mynd: Säny Blaser*



***Partur av manninigini royna bátin, áðrenn hol verður sett á stóra túrin***
*Mynd: Säny Blaser*




***Johan Olsen, bátabyggjari á Tvøroyri, bygdi seksæringin Naddodd. Hann varð flotaður 31. mars 1997.***

um veður og vind. So hetta er ein máti at fáa smakkin av tí, sum teir gomlu víkingarnir fóru ígjøgnum.

Man skuldi kanska trúð, at Livar fyri tað mesta fer at sita við árarnar, men so er ikki.

– Tað verður nokk ikki so nógv róð. Nú havi eg róð nógv um høv, og er tað nógvur mótvindur, so rør man ikki, tí man kemur ongan veg. Men sjálvandi hava vit árar við. Kanska verða vit noydd at taka nøkur tøk onkrastaðni, serliga í norsku firðunum, sigur hann.

## Ein serligur bátur

Naddoddur bleiv bygdur av tvøramonnum í 1997 sum ein eftirlíking av siðbundnu víkingabátunum.

Navnið á bátinum, Naddoddur, kemur frá norska víkinginum Naddoddi. Hann var millum fyrstu norðmenn í Føroyum aftaná Grím Kamban og var búsitandi her.

Naddoddur verður mettur sum maðurin, ið uppdagaði Ísland. Tað gjørdi hann, tá hann einaferð var handilsørindi í Noregi. Á veg til Føroya aftur, kom óveður á hann, og hann rak av leið og endaði í Íslandi. Tað var kavi, og hann rópti tí landið fyri Snjóland – hetta vísti seg so at vera tað, sum vit í dag kenna sum Ísland.

Sostatt verður hendan ferðin, The Viking Voyage, eisini ein heiður til norska víkingin.

Samstundis er endamálið av varðveita og varpa ljós á víkingamentan og søgu, sum framtíðar ættarlið í Føroyum kunnu fáa gagn av.

Ferðin verður um 500 sjómíl og fer væntandi at taka einar 3-5 dagar.

Tá tey koma til Trondheim, verður skipað fyri móttøku har.

Naddoddur verður eftir ætlan verðandi í Noregi inntil í næsta ár. Hann skal vera á einum víkingasavnið í Trondheim.

## Gera nógv burturúr á Tvøroyri

Nógv verður gjørt burturúr á Tvøroyri í sambandi við hesa ferðina. Í SALT verður skipað fyri tveimum tiltøkum, har Andy Fitze fer at halda røður og fortelja frá sínum upplivilsum á havinum. Eitt tiltak verður fyri almenninginum, har mentamálaráðfrúa Sirið Stenberg eisini skal siga nøkur orð, og so verður eitt tiltak fyri ungum fólki.

Í august 2025 er ætlanin nevniliga, at ein ung manning úr Føroyum skal sigla Naddodd heim aftur, aftaná hann hevur verið á savninum í Trondheim allan veturin. Enn er ikki avgjørt, hvør skal manna bátin, men vist er tó, at Andy Fitze aftur verður skipari, og hann ætlar at finna tey røttu ungfólkini.

– Vit fara at leita eftir ungum fólki, sum kunnu koma við okkum næsta túr. Tað skulu vera fýra ung. Eg haldi, tað er ein nokkso kulur møguleiki. Tey fara at koma heim til sítt heimland við báti úr Noregi. Tað verður eitt stórt upplivilsi fyri tey, sigur Andy Fitze.